# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Johannes Nilssen frá HTF-stovuni helt ein kunnandi fyrilestur um fyrstuhjálp og trygd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

P/F Føroya Shell:

## Fyrilestur um fyrstuhjálp fyri MC-fólkum

**Hóskvøldið 22. juni skipaði Føroya Shell fyri fyrilestri um fyrstuhjálp fyri MC-fólki í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Á fundinum vóru umboð fyri MC-feløgini í Suðurstreymoy. Fyrilestrarhaldari var Johannes Nilssen frá HTF-stovuni**

### MC

Í seinastu viku skipaði P/F Føroya Shell fyri einum umfatandi trygdarátaki bæði fyri teirra egnu starvsfólkum og øðrum. Tiltakið var ein partur av einum heimsumfatandi átaki, har Shell setur heilsu, trygd og umhvørvi ovast á dagsskránna.

Í Miðlahúsinum var eitt tiltak fyri MC-fólk, har Johannes Nilssen frá HTF-stovuni helt ein kunnandi fyrilestur um fyrstuhjálp og trygd. HTF stendur fyri Heilsu, Tilbúgving og Fyrstuhjálp og samstarvar við Falk í Danmark.

Johannes legði dent á, at tey sum hava tikið fyrstuhjálparskeið fáa tey dagførd, og at tað er av stórum týdningi at tá t.d. fleiri motorsúkklur koyra túrar saman, skal minst ein av súkklunum hava fyrstuhjáplarútgerð við. Eisini kunnaði hann um menningina innan fyrstuhjálp.

Endamálið við fyrilestrinum var at fáa MC-fólkini at leggja størri dent á trygd og vera fyrireikað til at geva fyrstuhjálp.



# Gullbrúdleyp



30. juni 2006 hava hjúnini Sonja og Johannes Jakobsen, Saltangará, verið gift í 50 ár.

Sonja er ættað úr Klaksvík. Foreldrini vóru Fredrikka og Hans Hansen í Garðinum. Fredrikka var ættað úr Kunoy, og Hans var ættaður úr Klaksvík.

Johannes er ættaður úr Norðragøtu. Foreldrini vóru Nicolina og Amaliel Jacobsen. Nicolina var úr Norðragøtu og Amaliel var ættaður av Skipanesi.

Johannes fór til Klaksvíkar í 1948 at arbeiða á Lítlu Beding og byrjaði at læra til elektrikara hjá Tummas Thomsen í 1949. Aftaná lokna lærutíð fóru tey niður til Odense, har Johannes lærdi til el-innleggjara, meðan Sonja arbeiddi á fabrikk. Tey giftust á ráðhúsinum í Odense í 1956 og fóru síðan brúdleypsferð til Hamburg á motorsúkklu. Tey fluttu aftur til Føroyar sama árið og búsettust í Klaksvík, inntil tey í oktober 1958 fluttu til Søldarfjarðar, har hann byrjaði sítt arbeiðið sum el-innleggjari. Aftaná stutta tíð í Søldarfirði fluttu tey til Runavíkar, har tey búðu í húsunum hjá Linu og Sigurd Højgaard inntil summarið 1964, tá tey fluttu til Saltangará. Har hava tey havt el-innleggjaravirkið og handil (El-Húsið) inntil fyri fáum árum síðan.

Sonja og Johannes fingu fimm børn: Frígerð, Charles, Ivy, Filip og John, og ommu-og abbabørnini eru 12 í tali.

Gullbrúdleypsdagin verða tey burturstødd. Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku við degnum og ynskja teimum nógv góð ár og Harrans signing framyvir.

**Børnini**

# Gestabók á stødd við eina svávuldós

Vanliga eru gestabøkur millum A5 og A4 í stødd og ymiskar í tjúgd, men ein gestabók í stødd við eina svávuldós er ikki heilt vanlig. Eina slíka eigur Inger Hansen í Havn, sum fekk hesa mini-gestabókina fjá mammu síni, Herdis Danielsen (1911-1979), sum man vera ein tann minsta í landinum.

Søgan um hesa lítlu gestabókina er tann, at Herdis sum ung genta byrjaði at skriva saman við eini danskari gentu, Else Petersen úr Randers. Tær høvdu brævaskifti í mong ár. Tá so kríggið breyt út í 1940 kom ein støðgur í, men eftir kríggið hildu tær á við brævaskiftinum. Dóttir hesa Else Petersen og svigarsonurin búðu og arbeiddu eina tíð í Føroyum.

Hesa lítlu gestabókina fekk Herdis Danielsen einaferð sum gávu frá donsku vinkonuni. Fyrstu ferð hon var brúkt var tá hon og maðurin, Hilmar Danielsen, høvdu silvurbrúdleyp í 1961. Herdis (f. Nybo) og Hilmar vóru bæði av Hvítanesi.

Inger sigur, at mamman vildi hava øll, sum koma á vitjan at skriva í gestabókina, sum er full av smáum heilsanum. Seinastu ferð at skrivað var í bókina var á jólum 1978. Árið fyri at Hardis andaðist. Tað kundi verið áhugavert at vita, um fleiri slíkar bøkur eru at finna í landinum.



*Gestabókin er á stødd við eina svávuldós. Navnið hjá Herdis er graverað í bókina*



*Else Petersen úr Randers sum gav Herdis gestabókina*



*Herdis og Hilmar Danielsen í Havn. Um teirra yrkisleið er stutt at siga, at Herdis var á Sanatoriinum sum arbeiðisgenta, og eisini hjá dr.Lynge. Tey seinnu árini bant hon nógv fyri Heimavirkið. Hilmar Danielsen (1911-1984) fór til skips sum heilt ungur, seinni koyrdi hann lastbil hjá Júst Sivertsen í eini 19 ár, og fór síðan til Jón Hansen, har hann koyrdi lastbil í 21 ár. Har var hann, var til hann gavst at arbeiða. Hann átti eisini bát saman við svigarsoninum, so hann var ofta á floti, og nógv vóru tey sum fingu eitt grýtuklárt kók frá honum*